




# Norðan úr myrkrinum…

Val



LINJOHN CHRISITANSEN
Sambandsflokkurin

*(Tíverri var skeiv mynd í blaðnum í gjár, tí prenta vit greinina um, orsakið mistakið)*

Fiska vestan fyri Upernavik, onki skip innan fyri 200 fj. Eitt karr av útnyrðingi, kavar av møkum. Myrkt er næstan alt døgnið. Um miðdagsleitið hómast ein grái á luftini. Ísfjøllini eru nógv. Tríggir sterkir ísljóskastarar lýsa frameftir, so farðleiðin er trygg. Havhestar í hópatali kappast um, at sleppa at sita í ljósstrálunum. Nakrir sita stillir og njóta ljósið, meðan aðrir brótast um plássini. Minnir meg ikki sørt um politiska vígvøllin, nú tað stundar til val.

Eitt valdømi, ein modernisering av demokratinum. Velja tað tú vil – landspolitikkur.

Bardagin um at sita í tí politisku ljósstrálini er øgiligur. Ja til eitt, kortanei til eitt annað. Eftir situr so veljarin, hvat skal eg velja, hvør ræður í mínum flokki.

Fyri okkum í Sandoynni má støðan vera púra greið. Floksleiðslan má alment koma fram og siga okkum, hvat tín flokkur stendur fyri, aftan á valið. Tað er ikki spurningurin hvør myndar flokkin.

Mótsatt kann tín stemma vera við til at flyta oynna niður í 3. deild.

Havhestarnir vita av góðum grundum ikki, hvat demokrati er – vita vit tað.

Enn sita nakrir av gomlu havhestunum í ljósstrálini. Nakrir eru farnir, men nýggir eru komnir í staðin. Summir hava brotið seg fram at, aðrir komnir úr myrkrinum.

# Eingin ósemja í Vágum

**Tað var eingin ivi í Vága Sambandsfelagi um at stilla tingmannin Marjus Dam. Spurningurin var bert um hann skuldi vera einsamallur, ella um eitt valevni aftrat skuldi upp á listan**

LØGTINGSVAL
*Snorri Brend*

**Vágar:** Í farnu viku var avgjørt at tvey valevni eru á sambandslistanum – verandi tingmaður og Eivin Jacobsen úr Sørvági.

Undan fundinum var eitt tilmæli komið frá landsnevndini í flokkinum um at rættast var at stilla í mesta lagi tvey valevni upp í Vágum. Hesum tilmæli tók fundarfólkið eisini undir við.

Spurningurin á fundinum var tó, hvørt ein skuldi síggja burtur frá teimum atkvøðunum sum tann alment kenda forkvinnan í Kommunufelagnum og borgarstjórin í Sandavági, Rósa Samuelsen møguliga kundi fáa til eitt løgtingsval.

Á fundinum boðaði Rósa frá, at hon sjálv kundi loysa henda trupulleikan, tí møguleiki hjá henni var at fara upp á listan í Suðurstreymoy, haðani hon er ættað.

Fundarfólkið var samt um, at tað var ein sjálvfylgja at verandi tingmaður, Marjus Dam skuldi stillast upp. Síðani var atkvøðugreiðsla um, hvat hitt valevnið skuldi vera. Og her fekk Eivin 10 atkvøður, Rósa 7 og Gunnar 1.

- Eg vil bara siga, at her var eingin ósemja á fundinum, og alt fór fram í sátt og semju. Men tá tað síðani verður skotið okkum í skógvarnar, at vit ikki skoyttu um Rósu, so er hetta púra burturvið.

- Tann stóri trupulleikin í øllum hesum er eina valdømið. Semja var gott nokk um hetta á løgtingi, men hvørji kriteri'ir flokkarnir skulu stilla upp eftir og hvussu hetta skuldi skipast í praksis úti í teimum lokalu feløgunum, - tað var ikki sagt við einum einasta orði, sigur Eivin Jacobsen í stuttari viðmerking. Eitt dømi um hetta ráðaloysið er spurningurin, um ein tingmaður er friðhalgaður soleiðis, at hann altíð er vísur í at koma uppá ein lista.

Hann óttast fyri at týdningurin av teimum lokalu feløgunum so líðandi fer at minka burtur í einki, nú alt snýr seg um eitt valdømi.

At flokkurin hevur valt at stilla upp eitt valevni í Sørvági er eisini ein taktiskt avgerð. Tað er jú hiðani at formaður fólkafloksins, Jørgin Niclasen er uppstillaður.

Við fólkatingsvalið seinasta fekk Marjus Dam 126 atkvøður, Rósa Samuelsen 102 og Eivin Jacobsen 96.

- So her var rættiliga tætt okkara millum, sigur Eivin, ið sat sum borgarstjóri í Sørvági frá 2000 til 2004.



*- Vit eru samd í Vága Sambandsfelag, sigur Eivin Jacobsen, sum er eitt av valevnunum til løgtingsvalið*

# Tunilsformaður á tunnum ísi

JÓGVAN VIÐ KELDU



Hann átti at vitað betur, veit hann ikki tað, so eru bæði hann og kanska onnur við honum á skeivari leið.

Harmiligt er, at so dugnaligur maður, sum Bjarni Askam Bjarnason er, skal koma sær sjálvum út í nakað so tápuligt, sum at undirskriva mótmæli, sum eitt lítið egoistiskt panel av 50 túsund íbúgvum, loysir úr lagdi.

At fáa eitt starv, hevur ábyrgd við sær, og ofta "hægri" – ella betri lønt – fylgja størri ábyrgdir, ikki bert skrivaðar men eisini sjálvsagdar, tí er tað ov lætt at fara um hetta, at valfeløgini í Norðoyggjum ikki virða grundlógartryggjað rættindi hjá borgara.

Tá ein verður settur í starv, verða gjørdar fastar avtalur um møtiskyldu, ikki at koma fullur til arbeiðis, tagnarskylda etc. Samstundis eru avtalur, sum ikki verða festar á blað men so sjálvsagdar, at tann ið fær starvið, heilt náturliga veit tað.

**Starv og ábyrgd**
Eg haldi tað var Fríðrikur kongur áttandi, sum einaferð sendi boð eftir ein av sínum konstaplum. Hesin møtti upp í vanligum klæðum og ikki í uniformi.

Kongurin gjørdist ikki sørt illur og helt fyri "Hvussu ber tað til, at tú ikki ert í uniformi, tá eg kalli teg til samrøðu"? Hesin svaraði, at hann helt ikki, tað nú var so umráðandi, tí fundurin var so óformligur.

Tá segði kongurin við hann: "Ungi maður, minst til eitt, tú hevur valt hetta starvið, og við hesum fylgja nakrar ábyrgdir, sum tú skalt halda. Tú ynskti hetta starvið, meðan eg hinvegin eri føddur til tað. Gloym hetta ongantíð"!

**Grundlógin okkara rættur**
Sjálvsagt eigur Bjarni síni grundlógartryggjaðu rættindi, sum eingin kann taka frá honum, men tá hann hevur tikið við hesum starvi, sum var frívilugt, eigur hann at gera sær klár, at nú er heilt náturliga ikki alt frívilugt longur. Tað veit hann eisini sjálvur nú aftaná, og nýtist ikki at verja seg við synunum, útbúgvingarleguni í Føroyum og og koma við so bíligum argumentum sum, at vit onnur ikki geva honum møguleika grundlógartryggjaðu rættindi!

Vit ynskja øll eitt gott heilsuverk eitt vala skúlaverk, men tað verður ikki bert gjørt við meiri pengi, men heilt øðrum átøkum, við størri produktivari ferð og at hesi, sum hava útbúgvi seg, og sum tí eru til stórt gagn fyri okkum, eiga sjálvi at leggja størri orku í at eftirútbúgva seg, eisini fyri egnu skuld, so tey standa aftanfyri arbeiðið við styrki og sannføring.

**Á skeivari leið**
Spurningurin, sum eg nú siti eftir við, er: "Hevði hann so eisini verið ímóti Vága- og Norðoyatunlinum, um so er, at vit fara aftur í átta- og níti árini".

So segði stóri statsmaðurin, Thorvald Stoltenberg, á einum fundi eg var á um danska høvuðsstaðarøkið: "Da et projekt ser dagens lys, er ofte få med og mange imod. Med da et godt resultat foreligger, er alle med og alle har altid været med"!

Nei, tunilsformaðurin er veruliga á tunnum ísi, veit hann ikki tað, so er hann og kanska fleiri við honum á skeivari leið.

# 9 kvinnur og 23 mans vilja umboða Sambandsflokkin

POLITIKKUR
*Eirikur LIndenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin hevur sum fyrsti flokkur almannakunngjørt valevnislistan til løgtingsvalið. Á listanum eru níggju kvinnur og 23 mans, tilsaman 32 valevni kring landið.

Fimm av teimum sjey fólkunum, sum vórðu vald á ting seinast fyri Sambandsflokkin, stilla uppaftur. Bárður Nielsen fór fyrr í ár úr politikki, og Lisbeth L. Petersen hevur boðað frá, at hon gevst í politikki.

Bárður Nielsen varð valdur á ting í 2002 og aftur í 2004. Lisbeth L. Petersen varð fyrstu ferð vald á ting í 1990 og hevur sitið síðani.

Annars eru allr seks sitandi tingmenninir hjá flokkinum á listanum. Olav Enomoto í Vestmanna situr á tingi fyri Bárð Nielsen.

Báðir landsstýrismenninir, Bjørn Kalsø og Magni Laksafoss stilla eisini upp. Báðir stillaðu upp seianst í Norðoya valdømi, men hvørgin varð valdur. Bjørn Kalsø fekk 192 atkvøður og Magni Laksáfoss fekk 80.

**Sambandsflokkurin**

**Listin hjá Sambandsflokkinum sær soleiðis út:**

Helgi Abrahamsen, floksskrivari, Strendur
Svenning Borg, sjómaður, Vágur
Annfinn Brekkstein, vinnurekandi, Velbastaður
Johan Dahl, løgtingsmaður, Vágur
Marjus Dam, løgtingsmaður, Miðvágur
Jóhan Petur Davidsen, lækni, Argir
Olav Enomoto, løgtingsmaður, Vestmanna
Hans Albert Hansen, íløguráðgevi, Hoyvík
Maibrith Hansen, bankakvinna, Kollafjørður
Sæunn Ólavsdóttir Hansen, Leiðsluskrivari, Saltangará
Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri, Leirvík
Edva Jacobsen, bankakvinna, Fuglafjørður
Eivin Jacobsen, brand- og arbeiðsformaður, Sørvágur
John Kári Jacobsen, skipari, Hvannasund
Maj-Britt Jacobsen, lesandi, Kollafjørður
Edmund Joensen, løgtingsmaður, Oyrarbakki
Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, Tórshavn
Atli Fróði Johansen, lærari, Glyvrar
Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Klaksvík
Magni Laksáfoss, landsstýrismaður, Streymnes
Høgni Mikkelsen, býráðslimur, Hoyvík
Jóna Mortensen, bankakvinna, Tórshavn
Ingvør Nolsøe, stjóri, Tórshavn
Reidar Nónfjall, stjóri, Tórshavn
Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes
Svenn Ó. Olsen, framleiðsluleiðari, Syðrugøta
Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Tvøroyri
Georg L. Petersen, journalistur, Tórshavn
Joen Peter Petersen, kokkur, Skálavík
Rósa Samuelsen, borgarstjóri, Sandavágur
Bjarti Thomsen, granskari, Nólsoy
Jaspur Vang, løgreglumaður, Tvøroyri